## TILTØK

**Ebenezer**
Hósdagin kl. 20 heldur møtirøðin áfram við evninum »Frá ótta og stúran til trúgv og gleði«.

**Hvítusunnusamkoman Yviri við Strond**
Morgunmøti kl. 11,
kl. 12.15 sunnudagsskúli,
kl. 18 evangeliskt møti.

**Filadelfia, Landavegur 22**
Í kvøld kl. 19 Teen Xtreme, kl. 20 bøn fyri býnum v/ Sølvi, í annaðkvøld kl. 19.30 undirvísing »Tey fyrstu stigini«, kl. 21 ungdómsmøti.
Leygardagin kl. 17 landsbøn.
Møtiskráin hjá Filadelfia sæst á heimasíðu okkara: www.filadelfia.fo

**Føstugudstænastur**
*Argja kirkja* hósdagin 8. kl. 20: Høgni Poulsen.

**Meinigheitshúsið í Havn**
Hósdagin kl. 16-17 venur Gentukórið, kl. 20 ungdómsmøti við Hans Eiler Hammer.
Fríggjakvøldið kl. 19 venur Meinigheitskórið.
Leygarkvøldið kl. 21 opið hús.
Sunnudagin kl. 14 sunnudagsskúli, kl. 18 møti við Alfred Hansen, barnaansing er møtan møti er.
Mánakvøldið kl. 19 verður LU-arbeiðið – Grýturættur, kl. 20 venur Manskórið.

**Samkoman Immanuel**
Fríggjakvøldið kl. 20 Kongsins Herlið, 8 ár og eldri eru vælkomin.

**Skúlin á Hvítanesi**
Missiónsvikan byrjar fríggjakvøldið kl. 20.00, Sverri Steinhólm, prestur, talar.

**Meinigheitin í Hoyvík**
Hósdagin kl. 18-19 venur Salti í Hoyvíkar skúla og kl. 20 ungdómsmøti hjá Mariu við Skipá, Hákunargøta 5. Øll eru vælkomin.

**Rhema á Hálsi**
Fríggjakvøldið kl. 18-19.30 A.T.A.P. (Barnaklubbi).
Leygarkvøldið kl. 20 ungdómsmøti.
Sunnudagin kl. 17 møti og sunnudagsskúli. Øll eru vælkomin.

**KFUM og KFUK í Havn**
Hósdagin kl. 19.30 í KFUK: Andakt og sangur við Leilu Højgaard. Fólk í øllum aldri eru vælkomin við.

**Kirkju- og missiónshúsið á Argjum**
Hóskvøldið kl. 20 Føstugangstudstænasta.
Vegna grækarismessuhaldið er sunnudagsskúlin avlýstur. Víst verður til familjugudstænastuna kl. 11, har øll eru vælkomin. Møguleiki er at hoyra talur frá møtum á heimasíðu okkara: www.koma.fo

**Frelsunarherurin, Tórshavn**
Hósdagin kl. 20 Heimaforbundið. Emni við Elinborg Haraldsen.
Sunnudagin kl. 11 møti, Palli Petersen talar, kl. 13.30 sunnudagsskúli, kl. 18 møti, major Tjåland talar.

**Adventkirkjan**
Leygardagin kl. 10 barnabíbliutími og bíbliugransking. Evni: Bøn, hoyri Jesus, kl. 11 gudstænasta, J. V. Danielsen.

**»Tíð til Gud«**
verður úti í Pállstovu sunnukvøldið kl. 21. Dánjal Petersen talar. Dánjal av Rana og Jógvan Skúlindal skipa fyri.

**Filadelfia, Sundalagi**
Í dag frá kl. 16 til 17.30 Urtagarðurin, eitt trivnaðarstað hjá børnum í Hósvík, kl. 18 til 19 bønarmøti. Sunnudagin kl. 18 kvøldmøti.

**Keldan, Skálafirði**
Ungdómslegan byrjar fríggjakvøldið kl. 20. Einki opið hús leygarkvøldið vegna ungdómslegu. Sunnudagin kl. 17 møti við teimum ungu. Tú ert vælkomin í Kelduna.

**Lívsins Orð**
Tim. 5 verður í dag kl. 17. Barnamøti verður leygardagin kl. 17.30 og opið hús kl. 20.30. Sunnudagin kl. 17 verður møti.

**Soli Deo Gloria**
Hvønn mánadag kl. 20 bíbliutími og bønarmøti. Hvønn hósdag kl. 20 ungdómsmøti.
Leygarkvøldið kl. 22 opið hús.
Sunnudagin 11. kl. 14.00 sunnudagsskúli, kl. 16.30 ALPHA skeið (11-15 ár) kl. 18.00 møti við luttøku úr Rhema. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Missiónshúsið á Tvøroyri**
Hóskvøldið kl. 20 møti við Terja og Birgit Nielsen. Bønarmøti verður hvørt kvøld kl. 19.15. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Betel, Vágur**
Sunnudagin kl. 11, breyðbróting, kl. 13.30 sunnudagsskúli, kl. 18 evangel. fundur.
Mánadagin 12. kl. 20 bønarfundur.
Týsdagin 13. kl. 20 ungdómsfundur.
Ónsdagin 14. kl. 20 uppbyggingarfundur.

**Frelsunarherurin, Vágur**
Leygarkvøldið kl. 20 bøn og lovsangur.
Sunnudagin kl. 14 sunnudagsskúli, kl. 18 møti við major Knut Gamst.
Mánakvøldið kl. 20 Heimaforbundið.

**Reyði Krossur Føroya**
Sorgarlinjan svarar mánadag, mikudag og fríggjadag kl. 19-21.00 á tlf. 212380.

**Tilhaldið í Tórsgøtu 21**
Opið er mánadag kl. 10-18. Týsdag-fríggjadag 10-17. Drekkamunnur er at fáa hvønn dag eins og bløðini eru til taks.
*Mánadagin 12.3.*
kl. 9.45-10.15 Fimleikur. Sonja Danielsen
kl. 10.15-18 Seyma fýrkantar saman til teppir til móður Theresufelagskapin
kl. 14-18 Kortspæl, telving og onnur spøl. Tilmeld. til døgurðan og túrin mikudagin tlf. 316491
*Týsdagin 6.3.*
kl. 10-12 Vit baka
kl. 15 Frásagnir, søgur, prát og annað
*Mikudagin 7.3.*
kl. 10-13 Matgerð, Anne Grethe Harlou
kl. 12 Døgurði (tilm. mánadag 316491)
kl. 15 Túrur út á Tinganes. Frásøgufólk Gudrun Haustein og Maiken Poulsen
*Hósdagin 8.3.*
kl. 10.30-11 Fimleikur. Sonja Danielsen
kl. 14-17 Teldupráт á 1. hædd
*Fríggjadagin 9.3.*
kl. 10-17 Opið hús.

Tað er altíð ein krókur í Tilhaldinum - um tygum ikki fáast við nakað ítriv. Vit ynskja at øll skulu kenna seg vælkomin.

**Losjan í Havn**
Fríggjadagin kl. 15 hittast tilkomin og eldri til hugna.

**Vágs Matmøðrafelag**
Dagtilhaldið í Vági er opið týsdag og tórsdag frá kl. 15-18. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**AA-fundir í Havn**
Reinsaríið, Tórsgøta 5: Fundur verður í kvøld kl. 20-21.

**Al-anon**
fundur er hvørt týskvøld og hóskvøld kl. 20 á Vaskarínum í Tórsgøtu 5.

**Spælistovan í Meinigheitshúsinum í Havn**
er opin mánadag-mikudag og hósdag frá kl. 9.00-12.00 fyri foreldur at børnum uttan ansing.

**LFÚ-skrivstovan**
hevur opið týsdag og hósdag millum kl. 13 og 17. LFÚ-ráðgevingin hevur opið týsdag og hósdag frá kl. 16-18.

**LISA**
skrivstovan hjá Listafólkasambandi Føroya í Dj. í Geilsgøtu 1 er opin hvønn hósdag frá kl. 14 til 20 og annars eftir avtalu á telefon 320197. Teldupostur lisa@lisa.fo – heimasíða www.lisa.fo

**Kvinnuhúsið svarar alt samdøgrið**
á tlf. 317200
Skrivstovan er opin frá kl. 10 til 17, og hósdagar til kl. 21. Ráðgevingin er hóskvøld eftir avtalu.

**Amnesty International**
Føroya deild
Tinghúsvegur 18, 4. hædd
Skrivstovan er opin:
Mánadag, mikudag og fríggjadag frá kl. 13–17.

**Føroyskir fiskimenn**
uttanlands, tlf. 21 04 95.
Felagið fyri føroyskar fiskimenn í Canada, Svøríki, Danmark, Íslandi og Noregi. Limagjald 200 kr. um árið. Postgiro 57894. Fø. Sparikassi 442027-8.

**Felagið Føroyar-Kuba**
P. O. Box 2055, 165 Argir.
Tlf./fax 312098
Teldupostur:
far_cuba@hotmail.com
Viðtala eftir avtalu.

**MBF-skrivstovan**
Íslandsvegur 10c
Tlf. 317373 · Fax 310813
e-mail:
mbf@post.olivant.fo
Skrivstovan er opin hvønn dag frá kl. 9-16. Viðtala við sosialráðgevan fæst eftir avtalu við skrivstovuna á tlf. 317373.

**Deyvafelag Føroya**
Skrivstovan er opin mánadag til hósdag frá kl. 8.30 til kl. 15.30. Tlf. 31.7597, skrivitlf. 31.6929 fax 31.3609 og teldupostadr. deaf_fo@post.olivant.fo

**Giktafelag Føroya**
MBF Íslandsvegur 10 C
100 Tórshavn
Tlf. 310237 fax 310813
e-mail:
gikt@post.olivant.fo
Opið týsdag og hósdag kl. 10-13.
Fibromyalgibólkurin: Telefonviðtala týsdag frá kl. 10-12.
Foreldrabólkurin at giktsjúkum børnum: Betty og Noel Joensen, Klaksvík, tlf. 457337 eftir arbeiðstíð.
Ungdómsbólkurin: Sára Tummassardóttir, tlf. 373106 eftir skúlatíð.
E-mail:
sara@post.olivant.fo

**Cøliakifelag Føroya**
Postadr.: MBF-húsið, Íslandsvegur 10C.
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð, men samband við felagið fæst við at ringja til onkran av nevndarlimunum:
Annegreta tlf. 448664
Beinta tlf. 310574
Henning tlf. 314783.

**Nýrafelagið**
Postsmoga 1063
110 Tórshavn.
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð, men samband fæst við felagið á e-mail:
thomsen1@post.olivant.fo
Tlf. 315928, Odny
Tlf. 315786, Karin Elisa
Tlf. 315673, Katrin

**Føroya Astma/Allergifelag**
MBF-húsið
Íslandsvegur 10c
Tlf./fax 311419
Skrivstovan er á niðaru hædd og er opin hesar tíðir.
Týsdag fyrrapart kl. 10.00-11.30
Hósdagin seinnapart kl. 16.00-17.30.

**Føroya Felag Móti Krabbameini**
Ráðgevingarstovan er opin mánadag til fríggjadag, við telefontíð frá kl. 13-15.
Tlf. 31 79 59,
telefax 31 57 27.
E-mail:
ffk@post.olivant.fo

**Epileptikarafelag Føroya**
Postadr.: MBF-húsið, Íslandsvegur 10 C. Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð, men samband við felagið fæst á tlf. 313978, Randfríð Sørensen, ella tlf. 319793, Mari Johannesen.

**Føroyingafelagið í Odense**
hevur opið hvørt fríggjakvøld frá kl. 20. Tú finnur okkum á Rugårdsvej 21 (kjallarin), 5000 Odense C.
Tlf.: 25395563
Teldupostur: ffo@post.gs
www.ffo.subnet.dk

**Føroyingafelagið í Århus**
Vestergade 48D
8000 Århus C
Tel. 86 18 06 04
Húsið er opið mánadag til hósdag kl. 16-18 og fríggjakvøld kl. 21-03. Føroysku bløðini liggja frammi. Kaffi er ókeypis. Flogbóltur í Frydenlundskúlanum fríggjadag kl. 16-18. Sunnudagsskúli annanhvønn sunnudag (líka vikur) kl. 14.30. Føroyskur barnaskúli annanhvønn leygardag (ólíka vikur) frá kl. 11-14.

**Føroyingafelagið við fjørðin**
**Jægerspris.** Vit hava ymisk tiltøk nakrar ferðir um árið. Kundi tú hugsað tær at vita meira um felagið, ella lokalt, so ring til Fríði tlf. 47317438
Gudni tlf. 47387748

**Føroyingafelagið í Esbjerg**
Danmarksgade 25,
6700 Esbjerg,
tlf. 75132747
Opið hvørt mánakvøld kl. 19–22.00, har tú ert vælkomin at lesa bløðini, spæla kort og keypa tær ein kaffimunn.

**Føroyingafelagið í Reykjavík**
Ølduslóð 27
220 Hafnafjørður, Ísland
Tlf. 565 4883
E-mail: forrek@visir.is

## BRÚDLEYP

10. mars giftast Ó. Maria Bech og Jóhann Simonsen. Vígslan verður kl. 15 í samkomuni Immanuel, Hoyvík. Veitslan verður í HB-húsinum kl. 19.00.

## SILVURBRÚDLEYP

Mikudagin 14. mars hava hjúnini Lydia og Henning Pedersen, Ishøj, silvurbrúdleyp. Lydia er ættað úr Vági og Henning er fyrrverandi yvirkonstápil úr Mjørkadali. Opið hús er tann dagin í heiminum. Adr.: Landlyst Vænge 70, 2635 Ishøj.

## GULLBRÚDLEYP

Leygardagin 24. mars hava Hildigarð og Hans Høghamar á Eiði gullbrúdleyp. Tey, ið vilja gleða tey bæði, biðjast siga frá innan 15. mars á tlf. 423045.

## PRÓGV

Jón Hardley, Tórshavn, hevur fingið prógv frá Turistakademinum í Randers sum Akademi-økonomur innan ferðavinnu.



## TILTØK

**Føroyahúsið í Keypmannahavn**
*Vesterbrogade 17A*
*1620 København V*
Telefonupplýsing:
33231586
Dagliga telefonin:
33231587
Fax 33231588
E-mail addressa:
postur@faroehouse.dk
Heimasíðan:
www.faroehouse.dk
Á heimasíðuni er skráin, smátíðindi, feløgini og links víða um.
Kaffistovan er opin má.-frí. kl. 14 - 19
Bókasavnið um somu tíð.
Føroyskur døgverðamatur, fløgur, bøkur og pløgg fáast til keyps.
Vilt tú leiga ella skipa fyri tiltaki í húsinum, vendir tú tær til leiðaran.


COMPAQ
**Deskpro EX-skrivstovutelda**
Intel Celeron 533Mhz
64MB RAM
10GB Disk
48xCD-ROM
Compaq 17” skerm
Knappaborð og mús
Ljóðkort
Windows 98SE
3 ára garanti

Brakandi bíligt
9.990,- v/mvg
COM-DATA P/F
Tlf. 476173 og 449840


**Ráðgevingin fyri føroyingar í Danmark**
Vesterbrogade 17A
1620 København V
Tlf. 33239980
Fax: 33239234
Teldupostur:
fo.raadgivning@get2net.dk
Hjálp og vegleiðing í sosialum, persónligum og lestrarligum spurningum.
Opið er: Mánadag, týsdag og hósdag kl. 11.30-15.30, mikudag kl. 14-18, fríggjadag stongt (donsk tíð).

**Føroyingarfelagið í Aalborg**
Lille Kongens Gade 10 B.
Tel. 98136330
E-mail:
ffaalborg@mail.tele.dk
Álaborg er opin soleiðis:
Fríggjadag: Fimmarin frá 17.00 til 19.00
Leygardag: Opið hús frá 22.00 til 03.00.
Álakórið venur hvønn sunnudag kl. 18.00.
Kortkvøld er annaðhvørt fríggjakvøld frá kl. 19.00
Føroyskur dansur er annaðhvørt hóskvøld kl. 19.30.
Annars vera tiltøk, ið verða á skránni, lýst í Túnatosi, sum kemur út einaferð um mánaðin.

**Føroyingafelagið í Svøríki**
Vit hava tiltøk nakrar ferðir um árið. Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til Annu Westfahl á tlf. +46176269536 ella Innu Törnroos á tlf. +468853570.

**Føroyingar í Noregi**
E-mail:
foroyar@norden.no
Heimasíða: http://www.norden.no/foroyar
Norsk-Færøysk Lag skipar javnan fyri tiltøkum fyri føroyingum og fólki við tilknýti til Føroyar. Tiltøkini verða hildin í Oslo, og nærri upplýsingar um tíð og stað fáast við at venda sær til felagið á tlf. +4722674829.

**Føroyingafelagið Vesturskin, Bergen**
Vit skipa fyri tiltøkum nakrar ferðir um árið. Nærri upplýsingar við at venda sær til Sørin Danielsen, tlf. 56147684 ella Elsebeth Reines, tlf. 55229049.

**Sjómansheimið Ørkin í Reykjavík**
Møtini byrjaðu 1. oktober kl. 16 og verða hesa klokkutíð allan veturin.

**Føroyska sendingin »v/ Betesdabrunnin«**
er at hoyra á FM 92,2 MHZ miðbýurin, FM 106,5 MHZ Aalborg suður, og FM 107,4 Aalborg norður, hvønn leygardag kl. 10 og verður endursend sunnukvøld kl. 20.30.

**Evangeliska Røddin**
Odense. Føroyska sendingin frá Odense Radio hoyrist hvønn mikudag kl. 16.40, danska tíð, á FM 107,1 MHz.

**Føroyska nærvarpið í Esbjerg**
Føroyska sendingin »v/Betesdabrunnin« er at hoyra á FM 93,5 MHZ hvønn leygardag kl. 11 og verður endursend kl. 16.

**Føroyska arbeiðið Í Eliaskirkjuni**
*E-mail:*
*eliaskirkjan@get2net.dk*
Møti er hvørt leygarkvøld kl. 19 í Eliaskirkjuni á Vesterbro Torv, Vesterbrogade 49. Inngongd undir stóru trappuni. 5 min. at ganga frá Hovedbanegården, 2 min. frá Føroyahúsinum. Bussarnir 1, 6, 14, 16, 28 og 550S steðga nærhendis. Øll eru vælkomin. Nærri fæst at vita frá Atla Rasmussen, tlf. 32 969995, ella Øssuri Kjølbro, tlf. 36 77 38 20.

**Føroyskt barnamøti**
Hvønn mánadag kl. 17 er føroyskt barnamøti í »Fælles Fælleshuset« á C. W. Obel kollegium á Herningvej. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Heimamissiónin**
Hevur tú tørv á hjálp til at koma í ein kristnan felagsskap, ella ynskir tú at hjálpa til í andaligum arbeiði á fólkakirkjunnar grund í Danmark, so kanst tú ringja til: Hera Elttør, Aulum, tlf. 97473786, Jan Johannesen, Køb. tlf. 32886918/26272112, Birgir Johannesen, Køb. tlf. 35854159 ella Torleif Johannesen, Nes, tlf. 449024.

**Før. gudstænasturnar**
í Samuelskirkjuni, Thorsgade 65, 2200 København NV, eru hvønn 1. og 3. sunnudag í mánaðinum kl. 14. (Kirkjan er skamt frá Nørrebros Runddel). Presturin er at hitta á tlf. 38796146.

**Kristnastova**
Birmavej 36, København S, tlf. 32 55 18 09
fax. 32 58 61 49
e-mail:
kristnastova@get2net.dk
Kristiligur fundur er hvørt fríggjakvøld kl. 20.
Møti við breyðbróting er hvønn sunnumorgun kl. 11. Sunnudagsskúli er samstundis.
Bussarnir 5, 9, 12, 13, 37, 38 steðga nærhendis.

**Malta, Hirtshals**
Sunnudag: Kl. 11: Breyðbróting. Kl. 18: Evangeliskur fundur. Mikukvøld kl. 20: Bønar- og uppbyggingarmøti. Øll eru hjartaliga vælkomin til hesi møti. Eftir fundirnar bjóða vit ein drekkamunn.

**Føroyskt møti í Ålborg**
Føroysk møti eru fyrsta leygardag í hvørjum mánaði kl. 19 í hølunum hjá Bethania kirkjuni á Dag Hammerskjølds Gade 2. Drekkamuður er aftaná, øll eru hjartaliga vælkomin.


# Skrivstovufólk

Til skrivstovu okkara í Kollafirði verður søkt eftir fólki við skrivstovuútbúgving at byrja skjótast til ber.

Umsøkjarar við kunnleika til Navision Financials, Microsoft Excel og Word hava fyrimun. Vit rokna við, at tú ert ágrýtin og áhugað/ur í at náa góð úrslit.

Arbeiðið umfatar m.a.:
- Røkt av ognarum og skuldarum
- Annað vanligt bókhaldsarbeiði
- Samskifti við peningastovnar

Av tí at tú kemur at arbeiða í tøttum samstarvi við roknskaparleiðara, skrivstovufólk og annars allar partar av Vestlax samtakinum er av týdningi, at tú ert fyrikomandi og leggur dent á samstarvið.

Vit takast við at ala laks og síl, hagreiða, góðska og marknaðarføra somu úrdráttir á evropeiska eins væl og á amerikanska meginlandinum og í Fjareystri.

Tá bygnaðurin í felagnum er soleiðis háttaður, er møguleiki fyri at fáa innlit í og hollan kunnleika um, hvussu eitt framkomið virki er samansett. Ein góður førningur til at byggja eina víðari útbúgving á.

Hevur tú hug og áræði til eitt spennandi arbeiðspláss, set so nakrar reglur saman um teg sjálva(n) og send okkum tær saman við prógvum og viðmælum í seinasta lagi 15. mars 2001.

Nærri fæst at vita við at venda sær til Tóka Højgaard ella Niels Dann West, tel 42 16 91.

VESTSALMON

**P/F Vestsalmon · Postboks 82 · 410 Kollafjørður · Att: Tóki Højgaard**

*P/F Vestsalmon er partur av Vestlax samtakinum. Virkið hagreiðir umleið 15.000 tons av alifiski árliga og her arbeiða umleið 80 fólk. Vestlax samtakið samstarvar við Pan Fish ASA. Í Føroyum eru umleið 180 fólk í arbeiði. - Vestsalmon framleiðir eftir góðskuskipanini ISO 9000 / HACCP og selur alifisk serliga til marknaðin í Evropa, USA og Asia.*



GEVIÐ BLÓÐ
BLÓÐBANKIN
Telefon 311397


## HAVNAR BIO



Hósdagin 08.03. kl. 22[00]



Hósdagin 08.03. kl. 19[45]



Hósdagin 08.03. kl. 22[30]
– *Seinasta sýning*



Hósdagin 08.03. kl. 17[30]



Hósdagin 08.03. kl. 20[00]
– *Seinasta sýning*

**KOMANDI FILMAR**



**Frumsýning**
**Fríggjadagin 09.03.**



**Frumsýning**
**Fríggjadagin 09.03.**

**www.in.fo/havnarbio**